Fiskirannsóknarstovan

# Umhvørvisvinarligur trolgrunnur

## Royndir gjørdar við M/tr Randi

**FRS smárit 03/04**

# Umhvørvisvinarligur trolgrunnur

Royndir gjørdar við M/tr Randi á landleiðini

| | |
|---|---|
| Tíðarskeið: | 26/9 – 6/10 2003 |
| Ábyrgd: | Kristian Zachariassen |
| Við fyri FRS: | Kristian Zachariassen |
| Skrivað frágreiðing: | Kristian Zachariassen |

**Samandráttur:**
Ofta verður sagt, at trolreiðskapur fer illa við botninum, tí hann verður drigin eftir botni og harvið skaðar lívið á og í honum.
Líggjas Hansen úr Sørvági hevur í nøkur á arbeitt við einum trolgrunni, sum hann meinar fer nógv betur við botninum, tí hesin grunnur rullar eftir botninum soleiðis, at hann ikki skaðar botnin. Hjólini á hesum grunni eru gjørd soleiðis, at tey rulla altíð sama veg, sum skipið tóvar. Fyrr vórðu grunnar nýttir, sum kundu rulla, men trupulleikin við teimum var, at teir ikki rullaðu sama veg, sum skipið tóvaði. Botnvinarligi grunnurin hjá Líggjasi er vístur á mynd 1 og 3.

Í september 2001 vórðu tær fyrstu royndirnar gjørdar við hesum grunni. Endamálið var at samanlíkna fiskiskapin við tí vanliga grunninum og hesum grunninum. Eisini var endamálið at síggja, hvørjar broytingar skuldu gerast við honum, so sum, hvar hann skal styrkjast.
Tað vísti seg, at grunnurin var ov veikur, og skuldi broytast um hann skuldi verða nýtiligur. Eisini var fiskiskapurin við tí botnvinarliga grunninum verri, enn við tí vanliga grunninum.

Í 2002 varð hesin grunnur aftur royndur, eftir at hann bæði var broyttur og styrktur. Roynd vórðu tvey sløg av serligum grunnum. Tað vísti seg at grunnurin nú er nóg sterkur, men fiskar ov lítið í mun til ein vanligan grunn og hann gongur ov illa eftir botninum. Grunnurin koppar, um tað rekur, og tað kann føra við sær at trolið skrædnar, tí netið nemur við botnin og grunnurin melur seg inn í netið.

Í 2003 varð grunnurin aftur royndur, Hann var nú broyttur soleiðis, at hjólini á grunninum snara sær alt eftir hvussu trolið gongur. Trolgrunnurin vísir seg at rigga betur nú, hann koppar ikki um tað rekur og trolið skrædnar ikki av honum. Undirsjóvarupptøkur vórðu gjørdar av grunninum, tær vísa at hjólini á grunninum nú rigga sum tey skulu.
Fiskiskapurin er tó ov vánaligur við botnvinarliga grunninum enn í mun til ein vanligan grunn, tí er neyðugt at gera fleiri royndir fyri at finna útav hesum.

Skapini á teim ymisku grunnunum eru víst á mynd 2.

Filmklipp frá upptøkunum av grunninum er gjørt frá upptøkunum í summar. Eitt stutt klipp er á fløgu og eitt longri filmklipp er gjørt á VHS band.

**Endamál:**

Endamálið við royndunum var at samanlíkna ein trolgrunn, sum Líggjas Hansen úr Sørvági hevur gjørt, við ein vanligan rockhopper trolgrunn. Hesar royndir eru framhald av royndum, sum vórðu gjørdar í 2001 og 2002. Trolgrunnurin hjá Líggjas fer helst betur við botninum enn ein vanligur trolgrunnur, tí hann rullar eftir botninum, meðan ein rockhopper grunnur verður drigin eftir botninum. Grunnar vórðu nýttir fyrr, sum rullaðu, men hesin grunnurin er tó ikki líkur teimum. Teir gomlu grunnarnir, sum rullaðu, rullaðu ikki sama veg, sum trolið varð drigið, men um ein aksa javnfjaran við fiskilínuna. Tað vil siga, at bert hjólini á miðjuni rulla sama veg, sum trolið verður drigið.
Hjólini á hesum nýggja grunninum hjá Líggjasi rulla øll sama veg, sum trolið verður drigið. Sí mynd 1.

**Útgerð og framferðarháttur:**

Í 2003 varð M/tr Randi leigað til at gera royndirnar. Randi er 55 BRT til støddar og hevur ein Grenå 480 hk motor. Randi hevur loyvi at trola innan fyri 12 fj. um summarið.
Útgerðin, sum M/tr. Randi nýtti var tann sama, sum hann nýtir, tá hann fiskar á landleiðini innan fyri 12 fjórðingar.

| | | |
|---|---|---|
| Útgerðin var henda: | Trol: | Flatfiskatrol 380# við/rist. |
| | Forleingjarar: | 40 m 18 mm wire. |
| | Yvirbreidlar: | 20 m 12 mm wire. |
| | Undirbreidlar: | 20 m 18 mm wire. |
| | Grunnur | 10” fremst, síðan royndargrunnur |
| | Posi yvir: | 180 mm PET |
| | Posi undir: | 120 mm PET. |
| | | |
| | Ballóntrol 360# | uttan/rist. |
| | Forleingjarar: | 40 m 18 mm wire. |
| | Yvirbreidlar: | 20 m 12 mm wire. |
| | Undirbreidlar: | 20 m 18 mm wire. |
| | Vanligur grunnur | 32,70 m 12”. |
| | Posi: | 145 mm PET |
| | | |
| | Lemmar: | Poly Ice Concorde 2,8 m″ 700 kg |

Mynd 1 vísir tann botnvinarliga og tann vanliga grunnin á trolinum.
Mynd 3 vísir hvussu tann botnvinarligi grunnurin er gjørdur.

Gjørdir vórðu 3 túrar og 33 hál vórðu gjørd íalt. Tó var trolið hálað upp mitt á tóvinum nøkur tóv fyri at skifta band, á upptøkutólinum. Annars var framferðarhátturin við royndunum var júst tann sami, sum tá fiskað verður vanligt á landleiðini.

Trolið við tí umhvørvisvinarliga grunninum var mest roynt um dagin, tí tá var møguligt at gera upptøkur av grunninum uttan ljós.

Um náttina var trolið við tí vanliga grunninum nýtt, soleiðis at møguligar broytingar og umvælingar kundu gerast á royndargrunnin.

Orsaka av veðrinum og botnviðurskiftunum varð ikki roynt í sama stað alla tíðina. Tað vísir seg at botnurin eystanfyri ístøðum er ov myrkur til at gera upptøkur á, tí har er mórubotnur, meðan hann er góður norðanfyri, tí har er sandbotnur.
Mynd 4 vísir, hvar ið roynt varð.

Veiðan av hvørjum fiskaslagi varð skrivað í dagbókina
Upptøkur av trolgrunnunum vórðu gjørdar allar tríggjar túrarnar. Íalt vórðu 13 upptøkur gjørdar.

**Úrslit:**
Tann umhvørvisvinarligi trolgrunnurin riggar nógv betur nú, eftir at hjólini eru broytt. Grunnurin rullar eftir botni, sum hann skal, men smávegis broytingar skulu tó gerast við honum. Millum annað skal grunnurin ganga eitt sindur nærri botni, tí fiskur hevur møguliga hug at fara undir grunnin meðan tóvað verður.

**Niðurstøða:**
Botn og streymviðurskiftini við Føroyar eru sera ring. Um man hevur hettar í huga, so riggar grunnurin gott nú, men hann má fáast at rigga enn betur. Trupulleikin við at hann koppar og trolið skrædnar av honum, sær út til at vera loystur. Tann stóri trupulleikin er nú at hann fiskar minni enn ein vanligur grunnur, Hetta er so ætlanin at finna útav í 2004. Millum annað skulu broytingar gerast, soleiðis at eingi ov stór glopp eru millum grunnin og botnin.
At menna sovorðna útgerð tekur langa tíð, tí tað eru altíð óvæntaðir trupulleikar, sum koma fram, meðan man arbeiðir við menningini, men nú er sum nevnt komi væl ávegis at fáa grunnin at rigga.



Mynd 1: Trol og grunnar. Ovara myndin vísir tann botnvinarliga grunnin og tann niðara ein vanligan grunn.



Mynd 2.1: skapið á 1. grunninum, sum royndur varð



Mynd 2.2:  skapið á 2. grunninum, sum royndur varð



Mynd 2.3 skapið á 3. grunninum, sum royndur varð í 2003.




Mynd 3: Síðustykki av tí botnvinarliga trolgrunninum



Mynd 4: Kortið vísir hvar roynt varð.